SJÓVINNUSTÝRIÐ
FAROESE MARITIME AUTHORITY

**Alment tíðindabræv No. 03/2013**

## SAMSTARVSAVTALA ÍMILLUM FISKIVEIÐIEFTIRLITIÐ OG SJÓVINNUSTÝRIÐ
## Trygdin á sjónum í hásætið

Sambært nýggjari kunngerð hava Fiskiveiðieftirlitið, Arktisk Kommando og Sjóvinnustýrið gjørt avtalu um samstarv. Stovnarnir hava eina tíð havt samráðingar um samstarvsavtalu. Hesar samráðingar eru nú á mál, og hevur samstarvið sum endamál støðugt at bøta um trygdina á sjónum.

Í sambandi við vanligt fiskiveiðieftirlit kunnu eftirlitsfólkini á Brimli, Tjaldrinum og danska vaktarskipinum vegna Sjóvinnustýrinum nú eisini gera eftirlit við grundleggjandi trygdarviðurskiftum. Hetta fevnir t.d. um krøv til manningarásetan, útbúgving/førleikar hjá manningini, trygdarútgerð og krøvini til trygdarvenjingar umborð á føroyskum fiskiskipum.

Fráboðan E og Løgtingslóg nr. 63 frá 3. Juli 1998 um manning av skipum (við seinni broytingum), eru lóggáva, ið stýra nevndu krøvum. Lóggáva hevur so statt í áravís verið í gildi, har øll føroysk fiskiskip yvir 15 metrar og øll skip í vinnuligum rakstri eru fevnd av krøvunum. Men eftirlitið við umstøðunum umborð skal nú herðast við nýggja samstarvinum, sum er komið í lag.

Øll føroysk fiskifør yvir 15 metrar verða við hesum kunnað um nýggju herðingina á eftirlitið við trygdini umborð.

Hjálagdi kekklisti verður eisini lagdur fram til kunningar, so at skiparar og manningar kunnu gera sítt egna eftirlit umborð, til tess at tryggja sær, at øll viðurskifti eru í røttum lag. Á tann hátt kunnu teir standa fyrireikaðir, tá ið eftirlitsfólkini á vaktarskipunum koma umborð at hyggja at viðurskiftunum.

Viðheft: Eftirlitskekklisti

-- 00 --